LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 18

Fra: skugvoy@skugvoy.fo
Sendt: 21. februar 2024 11:45
Til: VMR-Journal
Emne: ferðavinnulógin Skúvoy Hoyringsskriv

Hetta uppskoti til ferðavinnulóg leggur sera nógv á kommununa at gera sum vit sum lítil kommuna slett ikki hava orku til og at betala sum vit heldur ikki hava nakran møvuleika at klára, tað er so nógv lagt út til kommunurnar sum er, at vit stríðast at fáða endarnar at røkka saman sum er, hetta uppskoti sigur at tað er tey lokalu sum skullu bestemma og leggja alt til rættis við eini ferðavinnuatlan, men hetta kann jú ikki vera so tíð alt skal góðkennast noðri í Havn av landstýrismanninum so tá vil eg siga man bestemmar onki og alt vald er hjá sitandi Landstýrismanni, har eru nógv onnur ting sum ikki eru útgreina orduliga men har skal landstýismaðurin skipa tað við kunngerð, aftur har, vit bestemma onki.

Kommunan og aktørar og jarðaeigarir her suðri eru komnir langt við at fáða eina vælskipaða ferðavinnu her suðri men við hesum uppskotinum vanti eg alt dettur niðurfyri, tíð hvør skal tíma tá onnur skullu bestemma og góðkenna alt sum tú ger, og hvussi kunnu fólk sum onki vita um oynna og lendi sita og siga um tað sum er gjørt er gott nokk ella ikki.

Hetta uppskoti gevur eisunu so fríðar ræsir til ferðafolki at landbrúk og seyðahald verur nastan ómøvuligt at halda.

Skúgvi er eisuni ein Ramsar oyggj og hvussi hendan lógin skal rigga saman við tíð veit eg ikki heilt, men hesi bæði tingini vilja heilt hvør sítt, vit hava gjørt rutir runt alla oynna fyri at stýra hvar folk gongur, tað er Føroyingar sum frítt hava at fara sum tey altíð hava gjørt og framvegis skulla men stadivækk halda seg til uppmerktu rutirnar sum eru gjørdar, men ongin útlendingur út um bøðgarðarnar uttan at staðkent fólk er við fyri at verja lendi og fuglalívi, tað gongur so ikki við hesi ferðavinnulógini, har útlendingurin hevur betalt fyri atgongd við komu til landi, og serliga hetta at bátar við leysamotori kunnu seta fólk á land har hella er, hellurnar hjá okkum liggja undur størstu lomviga bjørgunum sum Føroyar hava og hetta síggja vit sum eina vanlukku um tað verur loyvi.

Eg hopi at her vera stórar broytingar gjørdar árin hendan lógin verur koyrd ígjøgnum, tíð fyri okkum í Skúgvi sum eg lesi hetta uppskoti so bestemma vit onki meir hvørki kommuna fólki ella teir sum varða av jørðini

vinarliga

Poul Àsmund Tórarenni Borgarstjóri